# Fiskaði fyri heilar 38,6 milliónir í fjør

*Fimm føroysk fiskiskip fiskaðu fyri yvir 30 milliónir í fjør. Talan var um tveir rækjubátar, tveir flaka- og saltfiskatrolarar og ein nótabát*

| Skip | Dagar | Túrar | Menn | Fiskað í tonsum | Avreiðingarvirði (í 1.000 kr.) | Miðalprísur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Arctic Viking | 276 | 5 | 18,57 | 1.825 | 38.596 | 21,14 |
| Vesturvón | 248 | 2 | 36,00 | 1.010 | 36.932 | 36,56 |
| Høgifossur | 243 | 4 | 21,00 | 1.954 | 31.309 | 16,02 |
| Chr. í Grótinum | 269 | 37 | 11,34 | 55.794 | 31.114 | 0,55 |
| Akraberg | 232 | 6 | 27,55 | 1,902 | 30.596 | 16,08 |
| Sólborg | 242 | 5 | 18,17 | 1.912 | 30.325 | 15,86 |
| Ocean Castle | 267 | 5 | 18,90 | 1.785 | 29.573 | 16,56 |
| Tróndur í Gøtu | 228 | 28 | 12,10 | 45.530 | 27.213 | 0,59 |
| Hvilvtenni | 228 | 4 | 20,25 | 1.700 | 21.028 | 12,36 |
| Enniberg | 164 | 2 | 33,86 | 1.002 | 17.810 | 17,42 |
| Steintór | 289 | 25 | 12 | 1.601 | 17.062 | 10,65 |
| South Island | 309 | 7 | 13,54 | 1.359 | 16.735 | 12,31 |
| Ljósafelli | 231 | 4 | 25,89 | 900 | 16.680 | 18,53 |
| Nim | 313 | 44 | 10,25 | 516 | 16.668 | 32,30 |
| Skálaberg | 107 | 1 | 31,50 | 438 | 16.406 | 37,45 |
| Norðborg | 236 | 29 | 11,27 | 12.164 | 16.056 | 1,35 |
| Phoenix | 298 | 24 | 11,37 | 1.568 | 15.147 | 9,66 |

*Hendan talvan vísir tey fiskiskipini í føroyska flotanum, sum avreidu fyri yvir 15 milliónir í fjør. Uppgjørt er frá 1. januar til 23. desember. Talvan vísir, at 17 av teimum 107 skrásettu skipunum hava avreitt fyri meiri enn 15 milliónir í fjør. Sum tað sæst er onki av teimum vanligu ísfiskaskipunum ímillum tey bestu fiskiskipini í Føroyum í fjør. Talan er um um seks rækuskip, fimm flaka- saltfiskatrolarar, trý nótaskip, tveir djúpvatnstrolarar og eitt garnaskip, nevnliga Nim, sum gjørdi tað so avbera gott í fiskiskapinum eftir havtasku, at mansparturin kom heilt uppá gott 640.000, og tað er størsti manspartur á nøkrum skipi í fjør*

ÁKI BERTHOLDSEN

Rækjutrolarin, Arctic Viking, gjørdust besta, føroyska fiskiskipi í fjør.

Ein uppgerð, sum varð gjørd tollaksmessudag yvir gongdina hjá teimum 107 fiskiskipunum í Føroyum,vísir, at rækjutrolarin úr Kollafirði bleiv tað føroyska fiskiskipið, sum hevði størsta avreiðingarvirðið í fjør.

Arctic Viking fiskaði í fjør fyri 38,6 milliónir.

Arctic Viking var fimm túrar í fjør og teir vardu tilsamans 276 dagar. Tilsamans fiskaði hann 1.825 tons.

Miðalprísurin var 21,14 fyri kilo.

Taka vit ein lista yvir tey føroysku skipini, sum høvdu tær dýrastu lastirnar í fjør, sæst, at 17 skip fiskaðu fyri meiri enn 15 milliónir.

Ikki óvæntað eru fleiri rækjuskip ímillum tey. Av teimum átta rækjuskipunum, vóru tað bara Atlantic og Borgin, sum komu niðurum 15 milliónir í avreiðingarvirði.

Men Borgin fiskaði bara í 115 dagar. Teir tríggjar túrarnar, hon gjørdi hesar dagarnar, fekk hon 678 tons, sum hon avreiddi fyri 8,9 milliónir.

Atlantic var tríggjar túrar, ið vardu tilsamans 245 dagar. Tilsamans fekk hann 814 tons, sum vórðu avreidd fyri 14,9 milliónir.

Men á listanum yvir tey fiskiskipini, sum løgdu dýrastu lastirnar upp, eru eisini fimm flakatrolarar. Tann einasti av teimum seks flakatrolarunum, sum ikki kom á listan var Sundaberg, men hann var bara tann eina túrin, sum vardi 100 dagar.

Henda túrin fekk hann hann 350 tons, sum hann seldi fyri 12.938.000 krónur. Tað gevur honum ein miðal prís uppá ikki minni enn 36,96 fyri kilo.

Annars var Vesturvón næstbesta skipið í flotanum.

Hann var tveir túrar uppá tilsamans 248 dagar. hesar báðar túrarnar fekk hann 1.010 tons, og tey avreiddi hann fyri ikki minni enn 36.932.000 krónur í fjør.

Tað gevur Vesturvón ein miðalprís uppá 36,56 fyri kilo.

Men annars var tað ein annars flakatrolari, Skálaberg, sum hevði tann hægsta miðalprísin av øllum.

Skálaberg var bara ein túr í fjør og hann vardi í 107 dagar. Tann túrin fekk hann 438 tons í lastina og tey vóru seld fyri heili 16,4 milliónir. Og tað gevur Skálaberg ein miðalprís upp á 37,45 krónur fyri kilo og tað er dýrasti fiskurin hjá nøkrum skipi æi fjør.

Trý nótaskip kláraði eisini uppá listan fyri tey bestu skipini.

Tey eru Christian í Grótinum, sum fiskaði 55.794 tons í fjør og tey fekk hann 31,1 millión fyri. Miðalprísurin var 55 oyru fyri kilo.

Annars fiskaði Tróndur í Gøtu fyri 27,2 milliónir og Norðbog fyri 16 milliónir.

Annars var tað misjavt, hvussu tað gekk hjá hinum nótaskipunum.

Saksaberg fiskaði fyri 11,1 millión, hann var úti í 198 dagar. Krúnborg var úti í 174 dagar og fiskaði fyri slakar 13 milliónir, Jón Sigurdsson fiskaði fyri 14,5 milliónir í 260 dagar og Finnur Fríði fiskaði fyri slakar 14 milliónir í 197 dagar.

| Skip | Fiskað í tonsum | Avreiðingarvirði (í 1.000 kr.) | Miðalpr. |
|---|---|---|---|
| Eysturbúgvin | 2.375 | 13.717 | 5,75 |
| Vesturbúgvin | 2.390 | 13.645 | 5,70 |
| Stjørnan | 2.425 | 11.107 | 4,58 |
| Sardis | 1.399 | 11.096 | 7,93 |
| Topas | 1.399 | 11.096 | 7,93 |
| Polarhav | 2.427 | 11.088 | 4.56 |
| Grønanes | 1.567 | 10.301 | 6.57 |
| Vestmenningur | 1.577 | 10.242 | 6,49 |

*Átta av teimum 32 partrolarunum hava fiskað fyri meiri enn 10 milliónir í fjør. Tilsamans fiskaðu partrolararnir 38.194,7 tons*

| Skip | Fiskað í tonsum | Avreiðingarvirði (í 1.000 kr.) | Miðalpr. |
|---|---|---|---|
| Sigmund | 1.072 | 14.509 | 13,53 |
| Strandingur | 1.023 | 13.665 | 13,35 |
| Th. Nygaard | 1.040 | 13.339 | 12,82 |
| Morgunstjørnan | 1.228 | 12.466 | 10.15 |
| Grani | 801 | 12.225 | 15,26 |
| Venus | 865 | 12.162 | 14,06 |
| Fugltúgvan | 933 | 11.930 | 12,78 |
| Pison | 923 | 11.812 | 12,79 |
| Mascot | 864 | 10.908 | 12,62 |
| Polarstjørnan | 843 | 10.558 | 12,52 |
| Eysturoyingur | 749 | 10.402 | 13,88 |

*Hetta eru tey ísfiskalínuskipini, sum hava fiskað fyri yvir 10 milliónir í fjør. Talan er um 11 av teimum 21 línuskipunum. Rættiliga fittur munur á miðalprísinum, sum línuskipini fingu. Hægsta miðalprís hevði Grani, sum fekk 15,26 fyri kilo í miðal. Lægsta miðalprísin hevði Morgunstjørnan, sum fekk 10,15 í miðal*

### Tveir djúpvatnstolarar

Bara tveir djúpvatnstrolarar komu uppum 15 milliónir í avreiðingarvirði í fjør.

Besti Djúpvatnstrolari var Steintór í Hvalba, sum fekk 1.601 tons, sum hann avreiddi fyri góðar 17 milliónir.

Næstbestur var Phoenix, sum fiskaði 1.568 tons, ið hann avreiddi fyri gott 15,1 milliónir.

Annars var tað misjavnt, hvussu tað hevur gingist hjá teimum stóru trolarunum.

Beinta fekk 865 tons, sum hon avreiddi fyri knappar 7,9 milliónir. Boðasteinur fekk 873 tons, sum vóru avreidd fyri 10,8 milliónir. Brestir fekk 1.459 tons, sum hann fekk knappar 15 milliónir í kassan fyri og Niels Pauli fekk 1.461 tons, sum vórðu seld fyri knappar 14 milliónir. Suðringur fekk knappar 14,3 fyri síni 1.467 tons og Vesturvarði fekk 10,1 fyri síni 1.205 tons.

Ringast royndust árið hjá Mýlingi og Vesturskini, sum avreiddi fyri slakar átta milliónir í part. Sancy kom uppá 9,3 og Rankin uppá 9,9 milliónir.

Eisini hjá partrolarunum og línuskipunum hevur verið ógvuliga misjavt.

Umframt teir, sum eru á listanum gekk tað hampiligt hjá Ametyst og Jaspis, sum fiskaði 1.255 tons í part og avreiddi tey fyri knappar 10 milliónir í part. Gorpur og Skrápur avreiddu knapt 1.500 í part fyri 9,6 milliónir í part og Skarvur og Trastur avreiddu knapt 1.340 tons í part fyri 9,6 milliónir í part.

Men aðrir fingu minni, eitt nú fingu Akraborg og Varðborg 817 tons í part, sum tær avreiddi fyri 5,9 milliónir í part og Nýborg og Nesborg fingu 500 tons í part, sum tær avreiddu fyri 4,2 milliónir í part og at enda fingu Research og Skansatangi 593 tons í part og tað fingu teir 5,5 milliónir fyri í part.

Hjá garnaskipunum gekk eisini ógvuliga misjavnt. Umframt Nim, sum var eitt eindømi, tí hon avreiddi fyri knappar 16,7 milliónir, er tað bara Anita, sum kemur upp um 10 milliónir - og hon er beint omanfyri.

Annars seldi Aagot síni 258 tons fyri 5,9 milliónir, Oknin fiskaði 655 tons fyri 7,8 milliónir, Vesturland 494 tons fyri 9,3 milliónir og Ólavur Hvíti 350 tons, sum hann avreiddi fyri góðar 5,9 milliónir.

### Ymiskt fyri 4,5 millión

Afturat øllum hesum eru tað nøkur skip, sum ikki eru bólkað undir bólkunum, sum vit hava nevnt frammanfyri.

Tey eru níggju skip og tað besta av hesum skipunum var Fram úr Vestmanna, sum fiskaði 1.676 tons í fjør og tey vórðu avreidd fyri 8,4 millión.

Frystitrolarin Pelagos í Funningi fekk 2.806 tons í fjør og tey seldi hann fyri 8,2 milliónir. Sjúrðarberg fekk 6,1 millión fyri síni 484 tons og Fuglfirðingur fekk 5,3 milliónir fyri tey 614 tonsini, hann fekk.

Hoyvíkingur var bara úti í 129 dagar í fjør og hesa tíðina fekk hann 245 tons, sum hann avreiddi fyri 1,9 millión.

Og at enda kann nevnast, at mest umrødda fiskiskip í flotanum í fjør, West Freezer í Miðvági fekk 450 tons í fjør.

Og tey avreiddi hann fyri 7,4 millión. Tað gevur ein miðalprís uppá 16,08 krónur fyri kilo.



# William heiðraður

*Trý tey virknastu forløgini heiðra William Heinesen við bókaútgávum á 100 ára degnum.*

Bókadeild Føroya Lærarafelags, Fannir og Føroya Skúlabókagrunnur geva út bøkur eftir William Heinesen á 100 ára degi hansara. Í hesum sambandi verður skipað fyri kvøldsetu í Kommunuskúlahøllini 14. januar kl. 20.00.

Í fimmtiárunum myndprýddi William kommunuskúlahøllina við myndevnum úr Sjúrðarkvæðunum, hesar myndir eru stórfingnar og spennandi og skuldu verið góður karmur um eina kvøldsetu Williami til heiðurs. Á skránni verður dansur, sangur, tónleikur, upplestur og hugleiðingar. Børn í Kommunuskúlanum fara upp á gólv, Havnakórið fer at syngja tekstir hjá Williami og Edvard N. Debess og Teitur Lassen hava gjørt hvør sítt lag til yrkingar hjá Williami, sum teir fara at framføra. Myndir hjá Edwardi Fuglø til *Veingjaða myrkrið* verða sýndar fram.



*William hevur prýtt auluna í Kommunuskúlanum í Havn við evni úr Sjúrðakvæðnum*

### William ummælir fagrar listir

- Forlagið Fannir

William Heinesen skrivaði bøkur sínar á donskum. Tað vita øll. Men fæstu munnu vita, at hann eitt langt lív skrivaði greinir og hugleiðingar á føroyskum í tíðarritum og bløðum.

Mentamaðurin Jóhannes Enni, sáli, savnaði alt hetta tilfarið, og burtur úr tí hava Marianna Debes Dahl og Árni Dahl gjørt eitt úrval, sum forlagið Fannir gevur út undir heitinum *William ummælir fagrar listir.* Hetta eru umrøður og ummæli, ið William Heinesen skrivaði í árunum frá 1924 til 1984. Talan er um tilsamans 46 greinir, tólv kunnu vit nevna bókmentagreinir, fimtan bókaummæli, ein er um leiklist, fimm um tónlist, níggju um myndlist, og fýra kunnu vit rópa orðadrátt.

Aftast í bókini eru evnisyvirlit og navnaskrá.

Ingi Joensen hevur evnað kápuna til. Har nýtir hann málningin *Fjallaoyggjar,* sum Jacob Olsen, vinmaður Williams, málaði.

Á kvøldsetuni kunnar Marianna Debes Dahl um bókina og lesur brotið: *Hitt mikla stríðið um keisarans skegg.*

### Veingjaða myrkrið

Bókadeild Føroya Lærarafelags

Edward Fuglø hevur myndprýtt stuttsøguna *Veingjaða myrkrið.* Gunnar Hoydal hevur skrivað formælið og týtt søguna úr donskum.

Tað eru nøkur ár síðan, at Edward setti sær fyri at myndprýða eina stuttsøgu hjá Williami. Søgan *Veingjaða myrkrið* er avgjørt ikki lættasta søgan at fara í holt við, tí mest sum øll søgugongdin er í myrkri. Edward valdi tó júst hesa søguna, tí hon snýr seg um børn, og hann hevur alla tíðina havt barnið í huganum, tá ið hann teknaði myndirnar. Edward fer á kvøldsetuni at hugleiða um arbeiðið at myndprýða eina søgu hjá Williami.

Tað hevur hepnast Edwardi so væl at myndprýða søguna við 18 stórum myndum, at forløgini *Gyldendal* í Danmark og *Mál og menning* í Íslandi gjørdu av at geva bókina út saman við Bókadeildini. *Veingjaða myrkrið* kemur sostatt samstundis út í Føroyum, Danmark og Íslandi.

### Stjørnuskaldið undir Varða

- Føroya Skúlabókagrunnur

*Stjørnuskaldið undir Varða* er savn við myndum, tónum og tekstum eftir William Heinesen. Úrvalið er skipað eftir høvuðsevnum í skaldskapi hansara. Savnið er býtt í tríggjar høvuðspartar, ið eita *Fólk og samfelag, Lívgevandi máttur* og *Tilverufatan*. Tekstirnir eru allir týddir til hesa útgávuna og høvuðsdenturin er lagdur á at flyta William varliga og neyvt yvir í føroyskt og varðveita stevið og tónan í máli hansara. Flestu tekstirnir hava ikki áður verið útgivnir á føroyskum og eru í fullari longd.

Ann Ellefsen og Kristinbjørg Høgnesen, studentaskúlalærarar, hava staðið fyri úrvalinum, hava skrivað um rithøvundin og skrivað inngangirnar til einstøku evnistættirnar í savninum. Axel Tórgarð hevur týtt stuttsøgurnar, Gunnar Hoydal yrkingarnar og Zakaris Svabo Hansen greinirnar. Knút Olsen skrivaði nótarnar til Tívilsdøtur eftir lagi hjá Williami.

Hóast savnið er ætlað miðnámsskúlunum, er útgávan eitt frágerða gott høvi hjá almenninginum at ogna sær William í leikandi løttum nýtýðingum.

Á kvøldsetuni fara sjónleikarar at lesa tekstir úr savninum, og høvundarnir fara at siga nakað um William Heinesen og skaldskap hansara.


HEIMURIN BÍÐAR EFTIR TÆR

TAÐ STÓRA TELDUKOYRIKORTIÐ

- lykilin til framtíðaryrkið!







Sum navnið sipar til, er tað stóra teldukoyrikortið eitt framhald av tí vanliga teldukoyrikortinum. Hetta merkir, at fyri at tú kanst luttaka í undirvísiningini, skalt tú hava staðið royndirnar til vanliga teldukoyrikortið. Tað stóra teldukoyrikortið er eitt førleikaprógv, ið vísir, at tú hevur eina væl grundaða vitan um teld og kanst nýta telduna á einum framkomnum støði.

Eins og við tí vanliga teldukoyrikortinum er tað stóra teldukoyrikortið eitt evropeiskt førleikaprógv, sum prógvar tín teldukunnleika, og er tað sostatt galdandi í største partinum av Evropa.

**Tað stóra teldukoyrikorti hevur sjey modul:**
KST nýtsla (modul A), Windows framhald (modul B), Framhald í tekstviðgerð (modul C), Framhald í rokniarki (modul D), Framhald í dátugrunnum (modul E), DtP og vevsíðugerð (Modul F), Net og teldusamskifti (modul G)

**Próvtøkur**
Aftaná hvørt modul ber til at fara til próvtøku. Próvtøkurnar í modul A-F eru praktiskar royndir, meðan próvtøkan í modul G er teorietisk og skrivlig.

| TÓRSHAVN | Skeið nr. | Kl. | Prísur | Januar | Februar | Mars | Apríl | Mai | Juni |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Windows framhald (modul B) | D8 | 09.00-15.30 | 3600 | 24-31 | 07-14 | | | | |
| DTP og vevsíðuger (modul F) | D9 | 09.00-15.30 | 3600 | | 21-28 | 06-13 | | | |
| Net og teldusamskiftið (modul G) | D10 | 09.00-15.30 | 4700 | | | 20-27 | 03-10-17 | | |
| KST nýtsla (modul A) | D11 | 09.00-15.30 | 1400 | | | | 27 | | |
| Frammhald í tekstviðgerð (modul C) | D12 | 09.00-15.30 | 3600 | | | | | 02-04-09-11 | |
| Framhald í rokniarki (modul D) | D13 | 09.00-15.30 | 3600 | | | | | 16-18-23-25 | |
| Framhald í dátugrunnum (modul E) | D14 | 09.00-15.30 | 4700 | | | | | 29-31 | 06-08-13 |
| **KAMBSDALUR** | | | | | | | | | |
| Framhald í tekstviðger (modul C) | D16 | 09.00-13.00 | 3600 | | | 29 | 05-12-26 | 03 | |
| Framhald í rokniarki (modul D) | D17 | 09.00-13.00 | 3600 | | | | | 10-17-24-31 | 07 |

Fyri tey, ið melda seg til øll sjey skeiðini er kostnaðurin kr. 19.700,00 (excl. provtøkur)

SANSIR · TEL 355 355

**Ring í dag og vit senda fegin skeiðfaldara við fleiri upplýsingum og skeiðætlan**

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS

Útbúgving, eftir- og víðariútbúgving á Føroya Handilsskúla

Marknagilsvegur 77 · Postsmoga 177 · FO-110 Tórshavn · Tel 31 88 13 · Fax 31 33 74

T-postur: th-sth@post.olivant.fo · Heimasíða: http://sth.olivant.fo/